

*Teir tríggir sum hava stjórnað ella stjórna Norðurlandahúsinum í dag – f.v.: Niels Halm, stjóri; Lars Hjaltén sum er nýggjur stýrisformaður og Helvin Høst, fráfarni formaður*

*Mynd: Jan Müller*

# – Norðurlandahúsið er fyri allar Føroyar

**- Eg vóni, at eg kann geva mítt ískoyti til at føroysk mentan verður kend uttanfyri Føroyar, sigur nýggi stýrisformaðurin, Lars Hjaltén úr Svøríki.**

NORÐURLANDA-HÚSIÐ
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

Fyri stuttum fekk Norðurlandahúsið nýggjan stjóra. Og nú hevur stýrið fyri húsið eisini fingið nýggjan formann.

Hesi seinastu árini hevur danin Helvin Høst verið formaður, men varð nú avloystur av Lars Hjaltén úr Svøríki. Hann er tó ikki ókendur við arbeiðið, tí hann sat í stýrinum frammanundan.

Ein tann seinasta uppgávan hjá Helvin Høst var at avdúka ein málning av Erlendi Patursson, sum stríddist manniliga fyri at fáa føroyingum eitt slíkt mentanarhús.

Lars er fult greiður yvir tann týdning, sum Norðurlandahúsið hevur havt, og kemur at hava í framtíðini fyri føroyingar.

- Eg haldi, at Norðurlandahúsið hevur virkað væl síðani tað kom.

- Og í dag kann ein siga, at Norðurlandahúsið ikki einans er ein mentanardepil í Havn, men eisini er ein mentanardepil fyri allar Føroyar, sigur Lars Hjaltén í stuttum viðtali.

## Báðar vegir

Norðurlandahúsið hevur nú meiri enn 20 ár á baki, og hevur veruliga prógvað at tað var ein heppin avgerð at tað varð bygt í Havn.

Arbeitt hevur allatíðina verið fyri at geva føroyingum innlit í norðurlendska mentan, og at virka soleiðis fyri, at føroysk mentan eisini gjørdist kend í hinum Norðurlondum.

- Eg haldi, at hetta arbeiðið hevur eydnast sera væl. Og eg vóni, at tað eisini fer at verða soleiðis í framtíðini, sigur Lars Hjaltén við Sosialin, beint áðrenn hann skuldi fara við flogfarinum til Danmarkar fyrrapartin ígjár.

Hann er ættaður úr Svøríki, og væntar tí at hann fer at kunna geva sítt ískoyti til at vísa fram svenska mentan í Føroyum. Og øvugt!

- Eitt stórt arbeiði hevur verið gjørt, til tess at fáa allar føroyingar at kenna Norðurlandahúsið sum sítt. Og tað arbeiðið haldi eg hevur eydnast sera væl higartil, sigur Lars Hjaltén.

Eitt annað arbeiðið hjá stýrinum fyri húsið verður at virka soleiðis fyri, at tann nýggi stjórin, Niels Halm so skjótt sum tilber kann koma inn í øll viðurskifti í húsinum.

- Vit gleða okkum sera nógv til samstarvið við hann, sigur Lars.



*– Torbjørn Olsen dugir sum fáur at lýsa eyðkennini hjá teimum, hann málar, segði Helvin Høst, tá hann helt røðu í sambandi við avdúkingina*

*Mynd: Jan Muller*




**Nissan Micra 1.3 AUT**

**Skrásetingarnr.:** JF 664 **KM:** 65.500
**Árgangur:** 06.01.99 **Seinast sýnaður:** 10.09.03
**Viðmerking:** Krókur - Radio við fløguspælara - Sentral lás

**Kr. 64.000,-**



**Toyota Yaris 1.0 H/B Terra**

**Skrásetingarnr.:** VD 459 **KM:** 76.000
**Árgangur:** 21.04.99 **Seinast sýnaður:** 09.10.03
**Viðmerking:** El rútar - fjarstýrt sentral lás - el spegl

**Kr.72.000,-**



**Toyota Corolla 2.0 Diesel Vøruvognur**

**Skrásetingarnr.:** PA 657 **KM:** 66.000
**Árgangur:** 12.04.99 **Seinast sýnaður:** 29.10.04
**Viðmerking:** El rútar - el spegl - sentral lás - band spælara

**við MVG kr. 82.000,-**



**Honda Accord 1.6** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** SK 819 **KM:** 72.500
**Árgangur:** 28.04.00 **Seinast sýnaður:** 24.03.04
**Viðmerking:** El rútar - El spegl - Sentral lás - Alu felgur

**Kr. 108.000,-**



**Lexus IS 200 Sport 6G læder** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** TP 779 **KM:** 25.000
**Árgangur:** 05.09.02 **Seinast sýnaður:** 11.03.04
**Viðmerking:** Alufelgur - Klimaanlegg - El rútar - El spegl - Tónaðar rútar - Tokulyktir - El innstilling av setrum - Leður setur - Radio við bandspælara - Fløguboks 6 stk.

**Kr. 289.000,-**



**Toyota Avensis 2.0 TDI sedan** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** DP 630 **KM:** 135.000
**Árgangur:** 13.03.98 **Seinast sýnaður:** 01.08.04
**Viðmerking:** Fjarstyrt sentrallás - El-rútar - El-spegl - Radio við bandspælara

**Kr. 90.000,-**



**Toyota Corolla 1.6 Terra H/B** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** FE 963 **KM:** 16.000
**Árgangur:** 23.07.03 **Seinast sýnaður:** 23.07.03
**Viðmerking:** Krók - El rútar - El spegl - Fjarstýrt sentral lás - Fløgu spælara

**Kr. 158.000,-**



**Toyota Avensis 1.8 SOL sedan** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** SD 150 **KM:** 46.500
**Árgangur:** 07.12.01 **Seinast sýnaður:** 07.12.01
**Viðmerking:** AC - Fløguspælari - El rútar framman og aftan - El spegl - Fjarstýrt sentral lás - Radio stýring á rættinum - Leður rætt og gear knøtt - Hiti i setrunum - Tokulyktir - Diskant hátalarar framman

**Kr. 158.000,-**



**Toyota Corolla 1.6 Terra 5D STW** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** GE 573 **KM:** 45.000
**Árgangur:** 05.04.02 **Seinast sýnaður:** 05.04.02
**Viðmerking:** El rútar - El spegl - Fjarstýrt sentral lás - Fløgu spælara

**Kr. 148.000,-**



**Fiat Stilo 1.6** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** TJ 583 **KM:** 20.000
**Árgangur:** 11.07.02 **Seinast sýnaður:** 11.07.02
**Viðmerking:** Sentral lás - el rútar - el spegl - fløguspælara - innstilling av fjarðum (City/ASK)

**Kr. 139.000,-**

Fyrivarni verður tikið fyri møguligum prentvillum.

6 mánaða garanti

**Vit bjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-**
Garanti skipanin, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, ið eygsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
Kom og vitja okkum · landsins fremstu bilasølu.

Vegurin Langi • Hoyvìk • Tel. 353040 • Fax 353041
rs@reyniservice.fo • www.reyniservice.fo

REYNI SERVICE P/F